## Flytir inn á Nes

Blákrossheimið í Havn verður nú Blákrossheimið á Nesi. Blaðið hjá Heimamissiónini, Trúboðin, skrivar, at Blái Krossur hevur leingi arbeitt við at byggja eitt nýtt heim, og at avgerð nú er tikin um at byggja nýggja heimið í Neshaganum á Nesi í Eysturoy. Olga Magnussen, sum er leiðari á Blákross-heiminum í Havn, sigur við blaðið, at verandi heim er ótíðarhóskandi, og at umstøðurnar verða munandi betri í tí nýggja heiminum á Nesi.

## Nú niðanum

Bygdarráðið í Leirvík hevur nú broytt støðu í tí nógv umrødda málinum um vegaføringina til og frá Norðoyatunlinum og vil nú hava vegin niðan um bygdina. Fríðgerð Heinesen, borgarstjóri, sigur við Útvarpið, at tann ætlaða vegaføringin forðar fyri einari ætlan um bátahyl og aðrari menning í bygdini. Harafturat er hon ikki í samsvari við nýggju býarskipanina, og so hava fleiri ávarað ímóti at leggja ferðsluna ígjøgnum bygdina.

# Formula selur forrit uttan í heimi

**Áveg til Danmarkar á skeið í nýggjum forriti, gjørdust starvsfólkini á Statens Luftfartsvæsen greið yvir, at forritið, tey fóru til Danmarkar at verða undirvíst í, var ment í Føroyum.
– Jú, føroyingar eru komnir í gongd við at selja forrit uttanlands, ígjøgnum miðvíst menningararbeiði hjá okkum, sigur Torkil Holm Petersen, forstjóri í Formula.fo, sum hevur selt Invoice Workflow forritið, til fleiri enn 50 danskar fyritøkur og stovnar**



*– Jú, føroyingar eru komnir í gongd við at selja forrit uttanlands, ígjøgnum miðvíst menningararbeiði hjá okkum, sigur Torkil Holm Petersen, forstjóri í Formula.fo*

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyri tíð sótu nøkur starvsfólk hjá Formula í flogfarinum ávegis til Danmarkar. Í sama flogfari sótu nøkur fólk frá Statens Luftfartsvæsen, sum skuldu á skeið í Danmark í teirra nýggja forriti, sum kallaðist Invoice Workflow.

Fólkini frá Formula og Statens Luftfartsvæsen koma í prát, og tey frá Statens Luftfartsvæsen vildu illa trúgva tí, tá tey hoyrdu, at Invoice Workflow var eitt føroyskt forrit, sum Formula hevur ment.

– Stuttligt at síggja reaktiónirnar hjá starvsfólkunum hjá Statens Luftfartsvæsen, tá okkara starvsfólk greiddu teimum frá, at forritið var føroyskt, sigur forstjórin í Formula.fo, Torkil Holm Petersen, og leggur síðani smílandi aftrat, at vónandi vera fleiri slíkar søgur at siga frá.

### Selt forrit til donsku løgregluna

Og okkurt er, sum bendir á, at tað helst ikki verður so leingi. Formula hevur fyri stuttum selt áður nevnda forrit til alla tí donsku løgregluna, og tilsamans hevur føroyska fyritøkan selt forritið til umleið hálvthundrað danskar fyritøkur og stovnar, harímillum løgregluna, Statens Luftfartsvæsen, Kystdirektoratet og stovnar undir danska Fíggjarmálaráðnum.

– Jú, føroyingar eru komnir í gongd við at selja forrit uttanlands, ígjøgnum miðvíst menningararbeiði hjá okkum, sigur Torkil Holm Petersen.

### Menningarætlan frá 2001

Forstjórin greiðir frá, at tað var í 2001, at Formula.fo fór undir eina ætlan, sum skuldi fáa gongd í útflutning av KT frá felagnum. Hetta stig varð mett at vera alneyðugt, um KT-vinna skuldi mennast til at verða ein vinnuligur valmøguleiki hjá Formula og føroyskum vinnulívið.

Á Formula løgdu tey eina nágreiniliga ætlan um, hvussu skuldi farast fram: hvørjir marknaðir skulu satsast uppá, hvat slag av forritum skulu mennast, kostnaðarmetingar og so framvegis.

– Úrslitið av hesi fyrireiking var, at vit helst skuldi forrita forritini soleiðis, at tey kundu samskifta og vera í samljóði við menningarambоð hjá ávísum størri KT veitarum á heimsmarknaðinum, fortelur Torkil Holm Petersen og nevnir Microsoft, Siemens og eisini onkrar aðrar.

### Forrita ymsar profilar

Síðani var farið undir at menna og víðarimenna trý nýggj forrit, sum øll høvdu hvør sín profil og appeleraðu til ymiskar fakbólkar.

Fyrsta forritið var eitt við navninum Patsec. Hetta er ætlað einum serligum málbólki – medicoteknisku-deildirnar á sjúkrahúsum. Í dag hevur Formula.fo selt Patsec til umleið 25 prosent av danska sjúkrahúsmarknaðinum.

Næsta forritið var eitt sokallað standardforrit. Eitt forrit til samskifti, telefonskipanir og telefonisamskifti yvirhøvur, og ber tað navnið TotalView.

– Hetta er ein sera framkomin skipan, sum hevur góðkenning frá høvuðssætinum hjá Siemens í Týskalandi, sigur Torkil Holm Petersen um forritið, ið hevur áleið eins nógvar útlendskar brúkarar sum tað eru íbúgvar í Føroyum.

Triðja forritið var eitt sonevnt "add-on"-forrit (forrit knýtt at aðrari skipan, blðm). Eitt forrit, sum fekk navnið Inwork Voiceflow og er ein elektronisk fakturaskipan beinleiðis knýtt at (add-on, blðm.) Microsoft pakkanum Navision.

– Invoice Workflow forritið hevur góðkenning frá Microsoft, og er sum tað einasta forritið av hesum slag sertifiserað av teimum, greiðir Torkil Holm Petersen frá.

Ætlanin hjá Formula við at velja og forrita trý so ymisk forrit, var, at teir soleiðis kundu leggja til merkis hvussu forritan, søla og arbeiði við útbreiðsluni gekk.

– Av hesi eygleiðing kunnu vit læra nógv um, hvussu vit í framtíðini skulu bera okkum at í sambandi við forritan, marknaðarføring og sølu av KT uttanlands, sigur Torkil Holm Petersen.

### Handverkið er gott

Forstjórin í Formula.fo sigur, at tey í dag kunnu staðfesta, at vegurin frá at hugsa um KT-sølu til útheimin, og til ein sær verulig úrslit av hesum arbeiði, er bæði langur og strangur.

– Formula hevur brúkt rættuliga fitt av peningi og heilt fitt av arbeiðsorku til hesar útflutningsætlanir, men sjálvandi eigur ein ikki at undirmeta ta menning og búning í stendst av slíkum ætlanum.

– Vit vita, at handverk okkara er gott og vit hava staðfest, hvussu sterk forrit verða ment. Okkara trupulleiki er marknaðarføringin og sølan av vøruni, men nú halda vit okkum hava eina hilling av, hví okkurt gongur væl og okkurt gekk minni væl í okkara royndum uttanlands, sigur Torkil Holm Petersen, sum at enda sigur, at tey á fyritøkuni arbeiða við eini størri verkætlan uttanlands, ið vónandi kemur upp undir land í hesum árinum. Ein verkætlan, sum skal gera tað lættari hjá Formula at selja forrit uttan í heimi.